

## BRÚKAR TÚ OV NÓGVA TÍÐ UPPÁ PAPPÍRSARBEIÐI?

**Lat okkum hjálpa tær!**

**Uppgávur, vit kunnu loysa fyri teg, eru:**

- Bókingar av øllum vanligum skjølum
- Fakturering til skuldarar
- Skuldara- og ognararøkt, rykking, avstemman og gjalding
- Avstemman og viðlíkahald av øðrum konti
- Mánaðar uppgerðir
- Budgettir og uppfylgjan
- Klárgerð av roknskapi til ársenda
- Hjálp til útfyllan av sjálvuppgávu

KREA · TEL 60 80 80

DAMBÓK

DAMBÓK sp/f, Álvastígur 9, FO-100 Tórshavn
Fartel 21 20 20, Fax 32 25 20, dambok@olivant.fo

ALVALON

KJÓADALSVEGUR 2 · 380 SØRVÁGUR
TLF. 363240 · FARTLF. 233240

# Alvalon søkir eftir námsfrøðingum

Søkt verður eftir einum námsfrøðingi at arbeiða í barnagarðsstovuni Barnalon , og eftir einum námsfrøðingi/stuðli til eitt barn við rørslubrekið . Bæði størvini eru uml. 30 tímar um vikuna.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setunarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. desembur 2009 kl. 12.00 viðmerk »umsókn«.

Lesið meira um starvið á heimasíðuni:
www.123hjemmeside.dk/alvalon

Sørvágs Kommuna
www.sorvag.fo

FØROYA LÆRARASKÚLI

# Føroya Læraraskúli
Fróðskaparsetur Føroya

# STØRV Á LÆRARASKÚLANUM

## Treytað av játtan verða hesi størv leys til at seta frá 1. januar 2010, møguliga 1. februar:

Eitt lærarastarv innan **SERNÁMSFRØÐILIGA ØKIÐ**, sum komandi várhálvu fevnir um undirvísing av pedagoglesandi. Stovnurin er farin undir at byggja upp nýggja útbúgvingargrein innan økið, ætlað bæði pedagog- og læraralesandi, umframt eftir- og framhaldsútbúgving fyri lærarum og pedagogum.

Eitt parttíðarstarv í **LÍVFRØÐI**. Starvið fevnir um linjulestur í lívfrøði (12 t/v) og í tvørgreinaligum náttúrulestri.

Eitt parttíðarstarv í **TÝSKUM** fyri linjulesandi á lærara-útbúgvingini, 12 t/v galdandi frá 1. febr. 2010 til 31. jan. 2011.

Umframt hægri útbúgving og førleika til undirvísing, vegleiðing og eftirmeting vænta vit, at umsøkjararnir í breiðum tvørfakligum høpi eru sinnaðir at verða við til at menna nýggju útbúgvingarnar, og eisini luttaka í øðrum virksemi og arbeiðsuppgávum sum t.d. toymis-samstarvi, starvslæruvegleiðing, menningarverkætlanum o.ø. Granskingarførleiki er ein fyrimunur. Eisini verður dentur lagdur á persónligar eginleikar, serliga samstarvs- og samskiftisevni og hugburð og evni at hugsa nýtt. Sum treyt fyri setan í fast starv verður eisini kravd námsfrøðilig og fakdidaktisk útbúgving og arbeiðsroyndir, ið samanlagt kunnu enda við lektarameting.

Talan kann verða um fast starv ella tíðaravmarkað starv, møguliga sum parttíð. Talan kann eisini gerast um royndarsetan 1-2 ár. Setan í fast starv er treytað av breiðari samanseting av nevndu fakøkjum.

Løn sambært sáttmála við Akademikarafelag Føroya ella avvarðandi yrkisfelag. Nærri fæst at vita við at seta seg í samband við Jóannes Hansen, rektara: joannes@flsk.fo. Umsóknarfreistin er **fríggjdagin 18. desember 2009 kl. 14.00** og allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknirnar við prógvum og CV verða sendar til

***Føroya Læraraskúla***
*Frælsið 20*
*Postboks 348*
*FO-110 Tórshavn*
*www.flsk.fo E-mail: flsk@flsk.fo*

Sosialurin / KvR 34 18 00




Á Læraraskúlanum eru tvær útbúgvingar, lærara- og pedagogútbúgvingin, og í ár eru 259 lesandi á stovninum. Frá august 2008 eru útbúgvingarnar umskipaðar til bachelorstøði, seinni við møguleika til at taka Master og Ph.D. Øll starvsfólk á skúlum og stovnum, sum Mentamálaráðið varðar av, skulu í framtíðini hava møguleikan at eftirútbúgva seg á einum og sama staði. Ætlanin er, at øll eftirúrbúgving skal flytast undir Fróðskaparsetrið, sum í framtíðini verður miðdepilin í eftirútbúgvingini, m.a. pedagogikum hjá miðnámsskúlalærarum og tann partur av Landsmiðstøðini, ið higartil hevur tikið sær av eftirútbúgving av fólkaskúlalærarum. Stovnurin, sum nú er lagdur saman við Fróðskaparsetri Føroya og Sjúkrarøktafrøðiskúlanum, er farin undir at byggja upp nýggjan linjulestur innan m.a. sernámsfrøðiliga økið og nýggja linjugrein í náttúru fyri læraralesandi, har fakdidaktikkur verður partur av innihaldinum. Hesar linjur eru, heilt ella lutvíst, ætlaðar at bjóða lærarum og pedagogum sum eftirútbúgving. Allir partar av útbúgvingunum verða lýstir í altjóða ECTS-lýsingum, ið tey settu hava skyldu til at vera við at orða. Royndar- og menningarvirksemi og gransking fer komandi árini væntandi at gerast ein alt størri partur av virksemi stovnsins.




Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.
Tel. 34 18 00
lysing@sosialurin.fo
Ring og fá ein prís!
Sosialurin